Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Nr. 27/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um tænastur til fólk millum 18 og 67 ár frá almannaverkinum, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvørjar tænastur hevur Almannaverkið at bjóða til heimabúgvandi fólk millum 18 og 67 ?
2. Hvussu eru tænasturnar býttar út á økini í landinum ?
3. Hussu nógv fólk millum 18 og 67 fáa tænastu frá Almannaverkinum ?
4. Hvussu er tænastan býtt á tal á fólki í ymisku økjunum ?
5. Eru tað bíðilistar til tænastu frá Almannaverkinum og um so er hvørjir ?

Viðmerkingar:

Síðan útleggingina av eldraøkinum hevur spurningurin um fólk í aldrinum 18 til 67 ár verið nógv umrøddur. Fleiri dømi eru um, at júst hesin bólkur dettur niður ímillum eldraøkið og almannaøkið. Úrslitið er í fleiri førum, at borgarar ikki fáa nøktandi tænastu.

Ymiskt er eisini, hvussu skipanir hjá landinum røkka út kring landið. Tænastur, sum eru í einum øki, eru ikki altíð tøkar í øðrum øki. Hetta kann gera tænastuna sera ymiska. Harvið verða lívskor og treytir hjá fólki ymisk, alt eftir hvar í landinum tey búgva.

Eitt dømi er endurvenjing og víðlíkahaldsvenjing, har tænastan er býtt sundur á kommunurnar, Almannaverkið og heilsuverkið og er ymisk kring landið.

Javnbjóðis rættindi til tænastur hjá fólki, sum eru sjúk ella hava tørv á hjálp frá tí almenna eigur at vera aðalmál. Tí hesir spurningar til landsstýrismannin, so vit hava nágreinað tøl at viðgera útfrá.

Á Løgtingi, 27. november 2019

Sirið Stenberg